## SKYN



| m² | m² | | |
|---|---|---|---|
| 210 | 988 | 2 | 1974 |



# Góð og væl hildin hús í Hoyvík

Her er talan um eini sera væl hildin og góð hús í tveimum hæddum. Í ovaru hæddini er durur, gongd, baðirúm við brúsu, køkur, stór stova og tvey kømur. Úr tí eina kamarinum er útgongd til eina altan. Í niðaru hæddini er durur, gongd, vesi við brúsu, trý kømur, fýrrúm/vaskikjallari og hjallur. Eitt gott bilhús hoyrir eisini til ognina.
Køkurin, sum er frá 2005, er sera snotiligur. Vindeyguni í ovaru hæddini eru skift í 2005. Frá stovuni er sera gott útsýni yvir fjørðin, Hoyvíkshólm, Havnina og Nólsoynna.
Frammanfyri húsini er ein stór grasplena, og við inngongdina er ein sera vakur og væl røktur urtagarður. Flísar eru á túninum rundanum húsini, og eisini er ein góð terassa og fleiri sólkrókar.
Húsini standa sera væl fyri beint við Hoyvíkar skúla, Hoyvíkshøll, ansingarstovnar, Keypssamtøkuna í Hoyvík og fleiri arbeiðspláss.
Húsini eru væl egnað til at hava bæði bústað og arbeiðspláss í sama húsi.

Tú fært meira at vita um húsini hjá Skyn tlf. 357 400 www.skyn.fo

**Prísuppskot: kr. 2.900.000,00**









